# Einki krav um sóttreinsan

**Tað verða bara bilar, sum koma úr Hetlandi, sum verða kravdir sóttreinsaðir, tá Norrøna fer undir summarsiglingina um ein góðan mánað**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Tveir tangar við sitrónsýrublanding á bryggjuni í Havn borga fyri, at munn- og kleyvsóttin ikki kemur við bilum úr Hetlandi og aðrastaðni til Føroya*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tað er einki krav um sóttreinsan av bilum, sum koma úr londum, har munn- og kleyvsóttin ikki er staðfest. Hinvegin er krav, at bilar, sum koma úr Hetlandi, skulu sóttreinsast, áðrenn teir sleppa at koyra í Føroyum.

Bilar, sum koma í land av Norrønu, tá hon kemur úr Hanstholm við farmi, verða sum er sóttreinsaðir á bryggjuni.

Men hetta er einki nakað krav frá myndugleikunum, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni. Hann sigur, at hann varð spurdur, um tað var skilagott at gera tað fyri líkasum at binda um heilan fingur, og tí kundi hann bara viðmæla, sigur hann.

Hinvegin er tað krav, at bilar, sum koma úr londum, har munn- og kleyvsóttin er staðfest, skulu sóttreinsast. Tað vil siga bilar, sum koma úr Bretlandi. Og har er Hetland íroknað.

## Summarsigling

Tann 19. mai fer Norrøna undir regluligu summarsiglingina og fer at sigla til Lerwic einaferð um vikuna.

Tá skulu allir bilar, sum koma í land í Føroyum, sóttreinsast, sigur landsdjóralæknin. Tað verður so eisini galdandi fyri bilar, sum komnir eru umborð í Bergen, sigur Bjørn Harlou, hóast teir ikki hava verið í landi í Lerwick.

Tað verður helst gjørt á sama hátt, sum gjørt verður nú, tá bilar úr Hanstholm verða sóttreinsaðir. Tað standa tveir tangar við sitrónsýrublanding á bryggjuni, og so stendur fólk við einum trýstspulara og spular hjól og undirvogn við hesi sitrónsýrublandingini. Somu viðgerð skulu »trailarar« og onnur akfør eisini ígjøgnum. Eisini skulu øll ferðafólk, sum koma til gongu i land av skipinum, ganga ígjøgnum eitt fat við sitrónsýrublanding og sóttreinsa skógvarnar, tey eru í.

Spurdur um hví hann ikki krevur, at bilar og fólk verða sóttreinsað í Lerwick, áðrenn tey koma umborð á Norrønu, svara Bjørn Harlou, landssjóralækni, at tað kann hann ikki. Hann hevur stutt og greitt ikki loyvi at seta krøv til myndugleikarnar í einum øðrum landi. Og vilja bretar ikki av sínum eintingum sóttreinsað tað, sum fer út av landinum, noyðast onnur at gera tað, við tað, sum inn kemur hjá teimum sjálvum.

Annars sigur landsdjóralæknin, at higartil er bara ávíst, at smitta er borin víðari við flutningi av livandi djórum. Eingin av teimum staðfestu tilburðunum av munn- og kleyvsóttini kann ávísast at vera borin við bilum ella øðrum slíkum flutningi.

## Trong ferðaætlan

Tað kann fara at taka tíð at reinsa eina heila skipslast av bilum, tá Norrøna í summar kemur fullsett á Havnina. Og hvussu tað fer at ávirka siglingina, vita tey ikki at siga á Smyril Line.

Ferðaætlanin er trong sum er, og har er einki út at geva. Skal skipið so bíða, meðan bilarnir verða sóttreinsaðir, so hvørt teir koyra í land, kann tað lætt fara at ávirka fráfaringartíðirnar til Íslands, verður sagt av Smyril Line.

Men samstundis verður sagt, at tey hava ongar reglur fingið at ganga eftir, hvussu hendan sóttreinsingin skal gerast. Um hon skal gerast inni á dekkinum. Meðan koyrt verður í land, ella um allir bilarnir fyrst skulu inn á eitt avbyrgt øki á havnarlagnum og har reinsast, áðrenn teir sleppa út at koyra.

Einasta tey vita á Smyril Line er, at bilarnir skulu sóttreinsast, tá teir koma úr Lerwick, verður sagt av skrivstovuni hjá Smyril Line í Tórshavn.

Heldur ikki Tórshavnar Havn hevur fingið nøkur boð um serlig tiltøk í samband við summarsiglingina hjá Norrønu.

Sum er gongur tað væl at sóttreinsa teir bilarnar, sum koma í land, segði vakthavandi á Havnarskrivstovuni, tá vit høvdu hann í telefonini í gjár. Og hann visti einki um, at annar arbeiðsháttur enn tann, at bilarnir verða reinsaðir, so hvørt teir rulla út av dekkinum, fer at verða nýttur.

# Smyril Line í SMS

FERÐAVINNA

Smyril Line hevur regluliga framsýning av slíkum, felagið hevur at bjóða viðskiftafólki sínum. Og ein slík framsýning plagar at vera í SMS í Havn við ávísum millumbilum.

Í ár verður hon nú í páskavikuni, Latið varð upp í gjár, og so verður básurin opin nakrar dagar fram.

Í básinum eru fólk, sum kunnu siga frá tí, Smyril Line hevur at bjóða viðskiftafólki, av ferðum og íbúðarmøguleikum. Nýggjast príslistarnir, ferðaætlanir og gistingarmøguleikar í ymsum londum eru høvuðsparturin av tí, tann forvitni vitjandi fær at síggja á básinum hjá Smyril Line í SMS hesar dagarnar.

**ej**




*Smyril Line hevur regluliga framsýningar »uttan fyri húsið«, sum tikið verður til. Nú í páskavikuni er framsýning á Torginum í SMS*

*Mynd: 3'arin*



# Óvist um Teistan



STRANDFERÐSLUTÍÐINDI
*Heini í Skorini*

Nýggja sandoyðarferjan Teistin fer sum teimum flestu kunnugt at sigla av Gomlurætt til Skopun komandi tíðina, men Strandferðslan veit ikki at siga við vissu, nær Teistin fer sín fyrsta túr tvørtur um Sandoyarfjørð.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskip Landsins, sigur, at teir royna at fáa Teistan at sigla skjótast gjørligt, men at tað er ymiskt, sum skal uppá pláss, áðrenn Teistin er til reiðar. M.a. skulu royndartúrar gerast, skipið skal vísast fram bæði á Sandoy og í Havn, og ymiskt annað praktiskt skal fella uppá pláss, áðrenn Teistin fer at sigla dagliga rutu millum Gomlurætt og Skopun.

Vónandi verða tað ikki eins nógvir trupulleikar við Teistanum og við nógv umtalaða Brimli, so sandoyingar ikki noyðast at bíða alt ov leingi.

## Ritan farin at sigla aftur

Seinastu tíðina hava Nólsoyingar siglt við Másanum út til Nólsoyar, men nú er Ritan aftur farin at sigla hesa leið.

Orsøkin til, at Másin hevur siglt um Nólsoyafjørð seinastu tíðina, er hon, at Ritan hevur verið til eftirlit, sum øll skip av trygdaráðum skulu einaferð um árið.

## Scania til landið mikudagin

Eisini hevur Strandferðslan leiga nýtt skip til siglingina um Leirvíksfjørð, og er navnið á skipinum Scania. Stranferðslan upplýsir, at Scania kemur til landið longu mikudagin seinnapart, og at farið verður í gongd við siglingina so skjótt hon er til reiðar, og eru tað góð tíðindi fyri klaksvíkingar.



# Løgreglan í Havn úr at gera

**Løgreglan í Havn hevði nógv at gera um vikuskiftið, og hóast talan ikki var um álvarsamar mannaskaðar, kundu fleiri tilburðir enda galið. Annars hava hinar politistøðirnar kring landið ikki havt tað stóra at gjørt**

LØGREGLUTÍÐINDI
**Heini í Skorini**

Í mótsetning til hinar starvsfelagarnar kring landið høvdu løgreglumennirnir í Havn nógv at gera gjøgnum vikuskiftið. Flestu tilburðirnir vóru ferðslutilburðir, og í summum av tilburðunum kundi skaðin verið nógv størri, enn hann var.

## Rúsdrekkakoyring

Fríggjadagin var ein maður tikin fyri rúsdrekkakoyring í Havn, og til alla lukku hendi einki álvarsamt, hóast maðurin var ávirkaður. Harafturímóti kundi skaðin væl verið størri sunnumorgunin, tá talan eisini var um ávirkaðan bilførara. Tá var eitt ferðsluóhapp meldað til løgregluna í Kollafjarðatunnlinum. Ein bilur á veg suðureftir kom knappliga at liggja uppá tvørs av vegnum, hann rendi inn í veggin í tunnlinum, og øll síðan á bilinum fór sera illa. Bilurin helt á sum einki var hent, og á veg suður til Havnar varð bilurin steðgaður. Førarin var fullur, og var hann eisini sovnaður meðan hann koyrdi inni í tunnlinum. Skaðin kundi verið størri, men hesaferð hendi einki álvarsamt.

## Onnur ferðsluóhapp og bardagar

Umframt rúsdrekkakoyring vóru eisini onnur óhapp í ferðsluni, sum ikki vóru orsakað av brennivíni. Leygardagin fór ein bilur á rull úti á Heiðavegnum á Argjum. Bilurin rullaði bæði langt og leingi tvørtur um vegin, áðrenn hann rakti ein annan bil, sum fór sera illa. Bilurin helt á oman eftir Heiðavegnum, fór síðani útav vegnum oman eftir einum skráningi, og rendi bilurin síðani á eitt hús. Eingin mannaskaði var, men bilurin fór sera illa.

Úti á Marknagilsvegnum í Havn var ein førari eisini tikin fyri at koyra væl omanfyri loyvda mark. Løgreglan upplýsir, at førarin koyrdi minst 130 km/t, tá teir við nýggjum mátitólið máldu ferðina hjá bilum beint eftir midnátt leygarkvøldið. Førarin rýmdi, áðrenn løgreglan kom, men hann var tikin seinni.

Á Norðara Ringvegi í Havn var ein samanstoytur millum tveir bilar, tá annar førarin, sum kom oman eftir Villingadalsvegnum, ikki yvirhelt víkiskyldu. Eingin mannaskaði var, men bert materiellur skaði.

Einasti tilburður, sum ikki var tengdur at ferðslu, var leygarmorgunin í miðbýnum í Havn uttanfyri Náttarravnin. Ein maður framdi harðskap móti øðrum manni, og var hann fluttur á sjúkrahúsið beinanvegin. Maðurin var kannaður, men var talan ikki um meiri enn smáar skaðar, sum høvdu brúk fyri eini læknahond.

Maðurin, sum framdi harðskapin, er kendur, og hann hevur fleiri ferðir fyrr verið íblandaður í slíkum tilburðum.

Sostatt hevur nógv verið at gjørt hjá løgregluni í Havn gjøgnum vikuskiftið, og hóast eingir álvarsamir mannaskaðar vóru, kundi talan lættliga verið um stórar vanlukkur.

## Friðarligt kring landið

Annars hevur løgreglan kring landið ikki havt tað stóra at gjørt ígjøgnum vikuskiftið. Í Eysturoynni varð ein tikin fyri rúsdrekkakoyring fríggjakvøldið, meðan eldur kom á ein útróðrabát í Vági. Stýrhúsið og partur av bátinum brendi, men eingin mannaskaði var. Hóast gulldansur var í Vestmanna, við tað at VÍF er føroyameistari hjá bæði monnum og kvinnum, gekk alt friðarliga fyri seg har.

Óvanliga friðarligt kring landið, meðan nógv var at gera í Havn.

